# Salt og kórkonsert í Fuglafirði

**Siloakórið og sangbólkurin Salt, sum fyri stuttum hevur fingið tilboð um at taka upp í USA, fara í annað kvøld at syngja í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

KONSERT
*Jóannes Hansen*

Í annað kvøld klokkan hálvgum níggju verður konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Tað er sangkórið í Siloa í Fuglafirði, sum fer at hava konsert saman við sangbólkinum Salt. Kórið, sum øll árini síðani endurstovnanina í 1988 hevur verið stjórnað av Eyðuni á Lakjuni, hevur seinnu árini altíð rundað sangárið av við einari konsert. Í fjør sungu tey í Mentanarhúsinum saman við Fuglfjarðar Sangkóri, og hesa ferð eru tey saman við sangbólkinum Salt, sum millum sangararnar hevur fleiri, sum eisini syngja við Siloa kórinum.

Siloa kórið hevur fjølbroytta skrá. Hesa ferð fara tey at syngja lættari sangir og ikki so nógvar av lokalum uppruna í Fuglafirði, sum tey onkuntíð hava gjørt. Millum løgini verður okkurt hjá Andraé Crouch, okkurt hjá Oslo Gospel Choir og okkurt Negro spiritual kent.

Gunnar Guttesen fer at spæla klaver, Bárður Háberg bass, og Jóhan á Lakjuni fer at spæla percussion. Solistarnir vera Karolina Højgaard, Elisabeth Hansen, Elsebeth Lassaberg og Bárður á Lakjuni.

Konsertin verður umleið hálvan annan tíma, og kostnaðurin verður 50 krónur.

## Væl fagnað í Skotlandi

Sangbólkurin Salt er væl dámdur. Ikki minst tá ið tey syngja a capella ella uttan undirspæl. Í bólkinum eru Arnvør á Torkilsheyggi, sum hevur gjørt nógvar av útsetingunum hjá bólkinum, Elsebeth Lassaberg, Edna Jacobsen, Paula Jespersen, Jóan Magnus Olsen og Bárður á Lakjuni.

Um mánaðarskiftið vóru tey í Skotlandi, har tey saman við sangbólkum úr m.a. Skotlandi og USA luttóku á sangstevnu í Fraiserburg. Á føroyingum, sum ferðaðust saman við sangbólkinum Salt, skilst, at føroyski bólkurin var sera væl fagnaður.

Millum luttakararnar úr USA var ein, sum hevur studio í Atlanta í Georgia, og sum serliga arbeiðir við a capella upptøkum. Hann vísti áhuga fyri at gera upptøkur við føroyska bólkinum, men enn vita tey ikki, um hetta fer at gerast til veruleika.

– Vit hava havt samband við hann, síðani vit komu aftur úr Skotlandi, og hann er framvegis sera áhugaður í at fáa okkum yvir til USA at gera upptøkur. Vit fara at arbeiða við hugskotinum, og næsta árið fer at vísa, um hetta fer at gerast til veruleika ella ikki. Men sjálvandi er tað áhugavert at fáa tilboð um at koma til USA at taka upp, sigur Bárður á Lakjuni.

Í Skotlandi varð serligur áhugi vístur eitt nú sanginum Fjart út um himmalhválvið, sum Zacharias Zachariassen umsetti úr svenskum og til føroyskt fyri nógvum árum síðani. Undan føroysku vitjanini í Skotlandi umsetti Gudmundur Johannesen, sum er hálvur føroyingur, eftir áheitan úr Føroyum sangin til eingilskt. Hetta var altso fyrsta ferðin, at hesin vakri sangurin við tí so sera vakra lagnum at hoyra á eingilskum. Um hugsanin at taka upp í USA verður til veruleika, so er ætlanin, at Salt skal venja fleiri sangir av hesum slagnum, sigur Bárður á Lakjuni.













# Bjóðaðu okkum 67 oyru afturat um tíman

**– Vit hava ikki verið í verkfalli í meiri enn 14 dagar fyri at fáa 67 oyru afturat um tíman, sigur Hergerð Joensen, næstforkvinna í Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– 67 oyru afturat um tíman.

Hergerð Joensen, næstforkvinna í Klaksvíkar arbeiðskvinnufelag, sigur, at hetta var alt, sum semingsmaðurin hevði at bjóða arbeiðarafeløgunum, nú hann aftur hósdagin royndi at finna semju ímillum arbeiðarafeløgini í verkfalli og arbeiðsgevararnar.

– Vit hava ikki verið í verkfalli í meiri enn 14 dagar fyri at fáa 67 oyru afturat um tíman, so tað var onki at gera, uttan at hava uppskotinum, sigur hon.

Hon sigur, at semingsmenninir løgdu eitt semingsuppskot fyri partarnar klokkan gott eitt fríggjanáttina.

– Eftir uppskotinum skuldu vit fáa 2,75 krónur afturat um tíman í lønarhækking um árið, ella 5,50 krónur afturat um tíman tilsamans í einum tvey ára sáttmálaskeiði.



*Ingeborg Vinther í Føroya Arbeiðarafelag og Hans Joensen í Havnar Arbeiðsmannafelag høvdu nógv at tosa um í gjáramorgunin. Tey vrakaðu eisini semingsuppskotið hóskvøldið og sostatt heldur verkfallið fram*

Tað skilst á Hergerð Joensen, at arbeiðarafeløgini vóru ikki sørt skelkað av hesum uppskotinum, tí tað er minni enn semingsuppskotið, sum tey vrakaðu fyri meiri enn 14 døgum síðani.

Tað gav arbeiðarafeløgunum 3,20 krónur afturat um tíman um árið, ella tilsamans 6,40 krónur aftutat um tíman í einum tvey ára sáttmálaskeiði.

Men hon skoytir uppí, at afturat teimum 2,75 krónum afurat, bjóðaði semingsmaðurin teimum 1% í eftirløn um árið hesuferð.

– Umroknað til peningi, gevur hetta 92 oyru um tíman. Tá ið alt er talt við, var hetta seinasta semingsuppskotið sostatt 67 oyru betri um tíman hvørt árið.

Næstforkvinnan í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag sigur, at hetta var so lítið, at tað var onki at gera, uttan at vraka tað.

Sostatt fóru partarnir hvør til sítt klokkan trý fríggjanáttina og verkfallið heldur fram.

### Álitið á semingsmenninar ikki styrknað

Hergerð Joensen sigur, at samráðingarnar hósdagin styrktu avgjørt ikki um álitið á semingsmenninar.

Tey hava fyrr ført fram, at semingsmenninar renna ørindi fyri arbeiðsgevaran og tað halda tey fast við, eftir semingsroyndina hósdagin.

– Tað er illgrunasamt, at semingsmaðurin heilar tvær ferðir leggur eitt semingsuppskot fram, sum liggur so nær tilboðnum hjá arbeiðsgevarunum, at teir góðtaka tað báðu ferðina.

Hon spyr, hvussu tað ber til, at semingsmenninir ikki leggja sama trýst á arbeiðsgevararnir, sum teir alla tíðina leggja á arbeiðarafeløgini.

– Tá ið hann soleiðis alla tíðina hugsar um, hvat arbeiðsgevararnir siga, verður ongin verulig seming, sigur Hergerð Joensen.

# Umhugsa atkvøðugreiðslu um semingsuppskotið

**Semingsmenninir umhugsa nú at senda seinasta semingsuppskotið til atkvøðugreiðslu ímillum teir 10.000-12.000 limirnar í arbeiðarafeløgunum, sum eru í verkfalli**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

Teir 10.000-12.000 verkafólkini, sum eru í verkfalli, skulu nú kanska til atkvøðugreiðslu.

Tað eydnaðist ikki at fáa fatur á semingsmonnunum, áðrenn evstamark í gjár, men Hergerð Joensen, næstforkvinna í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, sigur, at semingsmenninir boðaðu frá, at teir umhugsa at senda semingsuppskotið til frumatkvøðu ímillum limirnar hjá arbeiðarafeløgunum.

Men hetta eru arbeiðarafeløgini hart ímóti.

– Ein frumatkvøða er sera ódemokratisk. Har skulu minst 75 % av limunum atkvøða, annars er semingsuppskotið samtykt av sær sjálvum. Teir limir, sum ikki taka lut í atvøðugreiðsluni, verða sostat roknaðir at hava atkvøtt fyri.

Hergerð Joensen sigur, at hartil tekur ein slík frumatkvøðugreiðsla rættiliga langa tíð og hon heldur, at tað er óforvarligt at vera í verkfalli so leingi afturat.

Jan Mortensen sigur, at ein frumatkvøða kann fyriskipast rættiliga skjótt og tað hevði hann onki havt ímóti, tí so sluppu limirnir í arbeiðarafeløgunum at siga sína hugsan.

Arbeiðarafeløgini siga, at tað júst eru tit, sum hava ein fingur við í spælinum og hava ávirkað semingsmenninir til at umhugsa frumatkvøðu.

– Hatta tími eg ikki at gera viðmerkingar til. Tað eru so nógv, sum hava ein fingur við í spælinum ímóti arbeiðsgevarafeløgunum: Landsstýrið er ímóti teimum, løgtingið er ímóti teimum, semingsmenninir eru eisini ímóti teimum og somuleiðis Landsstýrismaðurin Fíggjarmálum, fyri ikki um at tala løgregluna og sjálvur Fútin er beinleiðis í parti við okkum.

– Tað kunnu vit so velja at taka fyri fult ella lata vera, sigur Jan Mortensen.

# Tað var við ringum tannabiti

**– Tað var við ringum tannabiti, at arbeiðsgevararnir góðtóku semingsuppskotið hóskvøldið, tí tað gevur nóg størri lønarhækking, enn vit høvdu sett okkum fyri at lata, sigur Jan Mortensen frá arbeiðsgevarafelagnum**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Tað var við ringum tannabiti, at arbeiðsgevararnir góðtóku semingsuppskotið, sum semingsmenninir gjørdu hóskvøldið.

Jan Mortensen frá arbeiðsgevarafelagnum, sigur, at semingsuppskotið gevur arbeiðarafelagnum eina nógv størri lønarhækking enn arbeiðsgevararnir høvdu sett sær fyri at lata.

Semingsuppskotið gav 2,75 krónur afturat um tíman um árið í tvey ár, ella 5,50 krónur í lønarhækking um tíman tilsamans.

– Men harafturat skuldu tey fáa 1% um árið í lønarhækking og tað er 50 oyru afturat um í lønarhækking um árið, ella ein króna afturat tilsamans tey bæði árini, sáttmálin skuldi vara.

Jan Mortensen sigur, at tilsamans er talan um eina lønarhækking upp á umleið 4% um árið.

– Hetta er væl meiri, enn vit hava sett okkum fyri at lata, tí vit halda ikki, at tað er forsvarligt at lata meiri enn 2,8% um árið, sum er miðal lønarvøksturin í Evropa.

Ì øllum førum meta vit, at kravið frá arbeiðarafeløgunum er høpisleyst.

Tað fyrra semingsuppskotið gav 3,4% um árið.

Hann sigur, at tí brúktu arbeiðsgevararnir langa tíð at umhugsa støðuna, áðrenn teir góðtóku semingsuppskotið.

Men alt tað kann gera tað sama, tí arbeiðarafeløgini vrakaðu uppskotið, tí tað gav ov lítið og so eru øll aftur í sama staði og sostatt stendur verkfallið við.



*Beinanvegin í gjáramorgunin hittust fakfeløgini til fundar at umrøða støðuna, nú verkfallið heldur fram. Jan Mortensen á arbeiðsgevarafelagnum heldur, at tey trívast best í skilaloysi*

Men av tí, at semingsuppskotið longu er farið upp um tað, sum arbeiðsgevararnir høvdu sett sær fyri at lata, verður tað tupult at hugsa sær, at teir fara at góðtaka eina lønarhækking, sum er hægri enn hetta semingsuppskotið, sigur Jan Mortensen.

### Trívast best í lógloysi

Jan Mortensen heldur, at støðan, sum føroyska samfelagið er komið í, er heilt burturvið.

– Vit eru einasta land í Evropa, ella í norðurlondum, har løntakarar eru tvingaðir at verða í fakfelag. Tað átti at gjørt, at fakfeløgini føldu eitt sindur av ábyrgd

Hann sigur, at øll donsk fakfeløg hava tað niðurfelt í sínar egnu lógir, at tað eru limirnir sjálvir, sum atkvøða um eitt semingsuppskot.

– Tað er gjørt tí at tey ásanna, hvussu álvarsligt tað er at kasta eitt samfelag í verkfall og har verða ongi tiltøk sett í verk, fyrrenn ein slík frumatkvøðugreiðsla hevur vrakað eitt semingsuppskot.

– Men slíkt høvuðbrýggj hava fakfeløgini í Føroyum ikki, tí tey trívast best í anarki, ella skilaloysi.

Hava fakfeløgini kki fingið heimild frá limunum at taka støðu til semingsuppskotini?

– Tað siga tey. Men tey hava 10.000 – 12.000 limir og hvussu nógvir av teimum hava verið við til at geva teimum hesa fullmaktina? Tað er bara ein brotpartur, sigur Jan Mortensen.


